# Vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum

Arbeiðsumhvørvi

# Børn og ung undir 18 ár

2021

**Hvat er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum?**

Endamálið við vegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er at vegleiða, hvussu ásetingar í lóggávu skulu skiljast/tulkast. Vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum
- greiða frá, hvussu krøvini í reglunum kunnu lúkast í royndum
- greiða frá vitan um at tulka reglu í sambandi við dómar
- greiða frá, hvussu viðkomandi lóggáva er samansett, og hvørji øki hon umfatar

**Er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum bindandi?**

Vegleiðingar frá Arbeiðs-og brunaeftirlitinum eru ikki beinleiðis bindandi fyri virki, aðrar myndugleikar, trygdarskipanir e.o., men vegleiðingarnar tulka reglur (lógir og kunngerðir), sum eru bindandi.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskilað í eini vegleiðing.

Virkini kunnu loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðs- og brunaeftirlitið metir tá, um hesin háttur er eins tryggur og í samsvari við reglurnar.

**Meira kunning**

Meira kunning og vegleiðing er at finna á heimasíðuni hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, www.arb.fo

**Arbeiðs- og brunaeftirlitið**

**Eirargarður 2, 2.hædd**

**FO-100 Tórshavn**

**+ 298 66 44 00**

**arb@arb.**

## Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ........ 1
Børn og ung undir 18 ár ........ 2
Børn yngri enn 13 ár ........ 3
Ung, 13 ár og eldri ........ 3
Arbeiði og skúlagongd ........ 5
Váttan um upplæring og kunning ........ 5
Kunning til foreldur/verja hjá 13 og 14 ára gomlum ........ 5
Handfaring av amboðum, tólum, evnum og tilfari ........ 6
Handfaring av evnum og tilfari ........ 6
Handfaring av amboðum og tólum ........ 6
Lyftingar ........ 8
Arbeiðstíð hjá 13-16 ára gomlum ........ 9
Steðgir hjá 13-16 ára gomlum ........ 9
Hvílutíð fyri 15 og 16 ára gomul ........ 9
Hvílutíð fyri 13 og 14 ára gomul ........ 9
Frísamdøgur fyri 13-16 ára gomul ........ 9
Lærlingar ........ 10
Revsing ........ 10

## Børn og ung undir 18 ár

Tá ið børn ella ung undir 18 ár verða sett í starv, skal arbeiðsgevarin tryggja, at arbeiðstíð og arbeiðsuppgávur hjá tí unga eru hóskandi í mun til aldur, menning, førleikar og heilsustøðu hjá tí, ið verður sett/ur í starv.

Ungir arbeiðstakarar hava ongar ella lítlar royndir á arbeiðsmarknaðinum. Teirra vitan og tilvitska um møguligar vandar í arbeiðinum er ofta avmarkað og hetta setur ungu arbeiðstakararnar í eina viðbrekna støðu, hvat viðvíkur trygd og heilsu. Arbeiðsumhvørvislógin ásetur serskildar reglur fyri arbeiðstakarar, ið eru yngri enn 18 ár. Hesar serligu reglur eru gjørdar fyri at verja ungu arbeiðstakararnar móti møguligum vandum í arbeiðinum.

Arbeiðsgevarin hevur lógarkravda skyldu at syrgja fyri at ásetingarnar í lógini um arbeiðsumhvørvi verða hildnar.

Endamálið við hesi vegleiðing er at nágreina reglurnar, ið arbeiðsumhvørvislógin ásetur um arbeiði hjá børnum og ungum undir 18 ár. Vegleiðingin inniber dømir um og tilmælir til, hvørjar arbeiðsuppgávur ungir arbeiðstakarar kunnu røkja og hvørji evnir, tilfar, tól og amboð ungu starvsfólkini av heilsu- og trygdar ávum ikki eiga at handfara.

## Børn yngri enn 13 ár

Børn yngri enn 13 ár kunnu ikki verða sett í arbeiði. Hesi kunnu tó fáa samsýning fyri at upptraðka í framførslum og tílíkum av mentanarligum ella listarligum slagi, luttaka í ítróttatiltøkum ella í sambandi við upptøku av filmi ella líknandi.

Fyri børn yngri enn 13 ár skal foreldur/verji geva loyvi í hvørjum einstøkum føri.

## Ung, 13 ár og eldri

Ung, ið eru 13 ár ella eldri, kunnu hava léttari arbeiði innan fyri avmarkað sløg av arbeiði og eftir ávísum treytum.

**Dømi um hesi eru:**

Sita við kassa í handli, hála fram vørur, seta vørur á hillar og líknandi lætt arbeiði -tó ikki flyta ella hava pening í varðveitslu uttan fyri uttan handilin

Lætt arbeiði við skiljing og pakking av vørum í handli ella á goymslu

Lætta avgreiðslu, lætta reingerð, rudding og ganga ørindir á gistingarhúsi og líknandi

Tænaraarbeiði, borðreiðing og rudda av á matstovum, kaffihúsum og líknandi

Avrudding og uppvask á matstovum, kaffihúsum og líknandi, treytað av at unga starvsfólkið hevur fingið gjølliga upplæring í nýtslu av uppvaskimaskinu og at unga starvsfólkið ikki handfer ídnaðarvaskievni, ið er sera etjandi.

Lætta matgerð, treytað av at frituran er tryggjað móti at koppa, at gólvið ikki er hált, at góð plássviðurskifti eru, at eldsløkkingarútgerð er við frituruna, og at unga starvsfólkið hevur fingið gjølliga upplæring í nýtslu av m.a. frituru

Lætta handliga samanseting, tó ikki sveising

Lætt málaraarbeiði, tó ikki sproytmáling

Léttari manuelt arbeiði, so sum at pakka posar, brævbjálvar og eskjur.

Handfaring av reinum klæðum

Egning/rekja um

Léttari fiskaarbeiði/skilja fisk

Útbering av avísum, lýsingum og líknandi

Lætt arbeiði innan landbrúk, gartnarí og vakstrarhús

Lætt arbeiði at seta bøkur á hillar á bókasøvnum

Lætt arbeiði á bóndagarði, tó ikki handfaring av evnum merktum við vandateknum ella organiskum uppløysingarevni

*Arbeiðsgevarin eigur altíð at gera eina meting av, hvørt aldur og menningarstøði hjá unga starvsfólkinum hóska til tær arbeiðsuppgávur og ábyrgd, ið starvið inniber.*

## Arbeiði og skúlagongd

Arbeiðsumhvørvislógin ásetur, at arbeiði hjá børnum og ungum skal skipast soleiðis, at ungi arbeiðstakarin hevur møguleika at røkja sína skúlagongd. Mælt verður tí til at arbeiðstakarar hava í huga, at arbeiðstímarnir hjá ungum arbeiðstakarum ikki eiga at verða so nógvir í tali, at tað ikki er møguligt hjá tí unga at røkja skúlagongdina.

## Váttan um upplæring og kunning

Áðrenn ung undir 18 ár byrja at arbeiða, skal arbeiðsgevarin geva upplæring í arbeiðinum og kunna um møguligar vandastøður og hvussu tær verða fyribyrgdar. Arbeiðsgevarin og tann, sum er yngri enn 18 ár, skulu skrivliga vátta, at upplæring og kunning eru farin fram.

Váttanin kann takast niður á www.arb.fo, undir *oyðubløð*.

Arbeiðsgevarin skal goyma váttanina og vísa hana fram, um Arbeiðs- og brunaeftirlitið krevur tað.

## Kunning til foreldur/verja hjá 13 og 14 ára gomlum

Tá ið 13 og 14 ára gomul verða sett í starv, skal arbeiðsgevarin kunna foreldur/verja um arbeiðið, teir vanlukku- og sjúkuvandar, sum møguliga eru knýttir at arbeiðinum, og um tey tiltøk, sum eru gjørd viðvíkjandi trygd og heilsu.

## Handfaring av amboðum, tólum, evnum og tilfari

Starvsfólk undir 18 ár mugu ikki verða sett at handfara amboð og tól, evni og tilfar og tílíkt, sum kann verða vandamikið fyri unga starvsfólkið.

Undantøk kunnu tó gerast, um ein persónur yvir 18 ár er til staðar í hølunum ella nærhendis tí unga og harvið kann hava eftirlit við og vegleiða tann unga. Tað er tá ein treyt, at hesin persónur yvir 18 ár hevur neyðuga førleikan at handfara tólið, amboðið, evnið ella tilfarið, soleiðis at viðkomandi dugir at meta um, hvørt handfaringin hjá tí unga kann elva til skaða.

Er tann ungi í læru við góðkendum lærusáttmála kann hann handfara amboðini, tá tað verður gjørt sum liður í læruni.

## Handfaring av evnum og tilfari

Starvsfólk undir 18 ár eiga ikki at handfara ella vera nærhendis vandamiklum evnum og tilfari.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið mælir til at ung undir 18 ár ikki handfara evni og tilfar merkt við einum ella fleiri av fylgjandi vandateknum:



Ella evni og tilfar, sum lúka treytirnar fyri flokking smb. CLP-reglugerðini í fylgiskjali: https://at.dk/regler/bekendtgoerelser/unges-arbejde-1049/bilag-4/

## Handfaring av amboðum og tólum

Arbeiðs- og brunaeftirlitið mælir til at ung undir 18 ár bert handfara fylgjandi amboð og tól, um hesi eru soleiðis, at teir deilir, ið flyta seg, ikki eru atkomuligir, tá ið maskinan er í nýtslu, og tað ikki eru aðrir vandar við maskinuni:

- Amboð við sag, so sum rundsag, klippi- og skurðamboð, fresara, avrættara, høvil, dreyibonk til metal og træ, breyð- og viðskeraskerara og borimaskinur við størri enn 13mm bori
- Maskinur við stempullíknandi rørslum, so sum mekaniskar-, hydrauliskar- og trýstluftspressur, stansimaskinur, klædnapressur, hoypressu og rusk- ella papppressu og onnur líknandi tól
- Maskinur við opnum valsi ella skrúvu so sum prentmaskinur, strúkirullur til klæðir og líknandi
- Blandi-, máli- og hakkimaskinur og líknandi maskinur, sum t.d. rívimaskinur, sentrifugur, rørimaskinur, deiggjeltimaskinur og kjøthakkimaskinur

**Arbeiðs- og brunaeftirlitið mælir til at ung <u>undir 18 ár</u>:**

Ikki arbeiða einsamøll eftir kl. 20:00
Ikki gera likamliga tungt arbeiði, ið yvir styttri ella longri tíð er skaðiligt fyri heilsu ella menning hjá tí unga
Ikki handfara stórar upphæddir av reiðum peningi
Ikki taka lut í flutningi av peningi
Ikki arbeiða har vandi er fyri at verða fyri harðskapi, uttan so at annar persónur yvir 18 ár eisini er til staðar
Ikki handfara motorketusagir, motorrunnaklipparar og líknandi
Ikki handfara seympistólir og boltpistólir, tó undantikið pistólir til heftiklemmur við einum massa á í mesta lagi 0,3g
Ikki handfara tól/amboð við einum arbeiðstrýsti á yvir 70 bar (7MPa) at nýta til reingerð, máling, rustviðgerð ella líknandi
Ikki handfara trukkar, traktorar, sjálvkoyrandi amboð/akfør og líknandi
Ikki handfara landbúnaðarmaskinur
Ikki handfara gravimaskinur, dumparar og líknandi
Ikki handfara pumpivognar, gaffillaðarar, gaffiltrukkar, sópingarmaskinur, reingerðarmaskinur og líknandi
Ikki handfara maskindrivin lyfti- ella flytitól
Ikki handfara kranar og onnur lyftitól og spøl, herímillum lyftitól til rørslutarnað
Ikki handfara mobilar persónslyftarar og arbeiðsplattformar, heingistillass, spøl og líknandi

Ikki handfara sláimaskinur, plenuklipparar, kantklipparar, trimmarar, kompostkvørnir, saksimaskinur og líknandi
Ikki handfara útgerð til sveising, ókrútsbrennarar, skeribrennarar ella líknandi útgerð
Ikki arbeiða við smyrjing, reingerð, umvæling og líknandi á maskinu ella tóli, ið er í gongd og har eitthvørt flytur seg og kann elva til persónskaða

Ikki arbeiða, har vandi er fyri háspenningsstoyti
Bert í stutt tíðarskeið og í mesta lagi íalt 30 minuttir hvønn arbeiðsdag handfara vibrerandi amboð/tól, so sum meitilhamara, slaglykil, betonvibrator, klinkuhamara, pussimaskinur ella onnur vibrerandi tól við vibratiónum yvir 130 dB (HA)
Ikki gera annað arbeiði, ið kann metast at vera vandamikið fyri tann unga

## Lyftingar

Um ungu arbeiðstakararnir hava arbeiðsuppgávur, har tey mugu lyfta, hála ella skumpa, eigur atlit at verða tikið til aldur og likamligu menningina hjá unga starvsfólkinum. Ungu arbeiðstakararnir eiga at fáa upplæring í, hvussu tey á heilsu- og trygdarliga forsvarligan hátt lyfta. A

Ein góð meginregla at nýta er, at ungir arbeiðstakara kunnu lyfta byrðar, ið viga upp til 12 kg. Viga byrðarnar meir enn hetta, eigur t.d. rulluborð ella sekkjavognur at verða nýtt.

## Arbeiðstíð hjá 13-16 ára gomlum

13-16 ára gomul kunnu arbeiða í mesta lagi 10 tímar um dagin.

Arbeiðstíðin skal taka atlit til aldur, førleika og menning hjá tí unga, soleiðis at arbeiðið kann útinnast heilsuliga og trygdarliga forsvarligt.

13-16 ára gomul kunnu bert í styttri tíðarskeið arbeiða um náttina (millum 24:00-06:00).

## Steðgir hjá 13-16 ára gomlum

Um dagliga arbeiðstíðin fer upp um 4,5 tímar, skal tann ungi (13-16 ár) hava ein steðg uppá í minsta lagi 30 minuttir. Steðgurin skal vera lagdur hóskandi í arbeiðstíðini.

## Hvílutíð fyri 15 og 16 ára gomul

15 og 16 ára gomul skulu hava eina samanhangandi hvílutíð uppá í minsta lagi 12 tímar í hvørjum samdøgri.

## Hvílutíð fyri 13 og 14 ára gomul

Ung 13 og 14 ára gomul skulu hava eina samanhangandi hvílutíð uppá í minsta lagi 14 tímar í samdøgrinum.

## Frísamdøgur fyri 13-16 ára gomul

Fyri hvørji 7 samdøgur skulu ung 13-16 ár hava tvey samanhangandi frísamdøgur. Hesi frísamdøgur skulu liggja soleiðis, at tey eru hóskandi fyri tey ungu við atliti til aldur og tað arbeiði, hesi útinna. Frísamdøgrini skulu altíð verða skipað soleiðis, at tey eru heilsu- og trygdarliga fult forsvarlig.

| | 13 ár | 14 ár | 15 ár | 16 ár |
|---|---|---|---|---|
| Arbeiðstíð | Í mesta lagi 10 tímar | Í mesta lagi 10 tímar | Í mesta lagi 10 tímar | Í mesta lagi 10 tímar |
| Steðgir | 30 minuttir, um arbeiðstíðin er longri enn 4,5 tímar | 30 minuttir, um arbeiðstíðin er longri enn 4,5 tímar | 30 minuttir, um arbeiðstíðin er longri enn 4,5 tímar | 30 minuttir, um arbeiðstíðin er longri enn 4,5 tímar |
| Hvílutíð | Í minsta lagi 14 samanhangandi tímar í hvørjum samdøgri | Í minsta lagi 14 samanhangandi tímar í hvørjum samdøgri | Í minsta lagi 12 samanhangandi tímar í hvørjum samdøgri | Í minsta lagi 12 samanhangandi tímar í hvørjum samdøgri |
| Frísamdøgur | 2 samanhangandi frídøgn hvørja viku | 2 samanhangandi frídøgn hvørja viku | 2 samanhangandi frídøgn hvørja viku | 2 samanhangandi frídøgn hvørja viku |

## Lærlingar

Um talan er um lærlingar við góðkendum lærusáttmála, kann arbeiðstíðin í einstøkum førum, tá ið arbeiðsumstøðurnar krevja tað, vera í mesta lagi 12 tímar. Lærlingar við góðkendum lærusáttmála kunnu arbeiða um náttina, um náttararbeiðið er ein liður í læruni.

## Revsing

Arbeiðsgevarar, ið fremja brot á ásetingarnar í arbeiðsumhvørvislógini um arbeiði hjá børnum og ungum undir 18 ár, kunnu verða revsaðir við bót, hefti ella fongsli í upp til eitt ár.
Afturat hesum kann tann, ið hevur foreldramyndugleikan av tí unga undir 18 ár verða sektaður, um so er, at viðkomandi er vitandi um at arbeiðið, ið er farið fram, er í stríð við reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini ella tær ásetingar, sum eru lýstar at galda eftir hesi lóg.